

*Harley Davidson-fjepparar koyra inn í Barcelona í Spania at hátíðarhalda, at 100 ár eru liðin síðani fyrsta Harley Davidson súkklan sá dagsins ljós. Fleiri túsund motorsúkklur savnaðust í tríggjar dagar við Monjuic festival í Barcelona. Myndin er tikin 29. juni í ár*

# Harley Davidson - nú umboð í Føroyum

**Í Føroyum eru umleið 250 skrásettar motorsúkklur, harav 14 eru Harley Davidson. Ove Ritter í Havn er blivin umboð fyri Harley Davidson motorsúkklurnar í Føroyum. Í hesum sambandi er ein framsýning í SMS (3-arin) frá 26. mars til 5. apríl.**

*Magnus Gunnarsson*

Tær heimskendu Harley Davidson motorsúkklurnar hava nú fingið umboð í Føroyum. Tað er fyritøkan HD-fo v. Ova Ritter ið er umboð fyri donsku Harley Davidson fyritøkuna CAPS-HD. Ove Ritter stendur fyri søluni, Árni Hansen er servicemaður og Jan Nolsøe stendur fyri verkstaði, viðlikahaldi og umvælingum.

Endamálið hjá HD-fo er at so nógv fólk sum gjørligt fáa møguleikan at ogna sær eina Harley Davidson motorsúkklu. Umframt sjálvar súkklurnar útvega teir Harley Davidson klæðir í besta kvaliteti til vaksin og børn.

Harley Davidson owner group (HOG) er heimsins størsti motorsúkklufelagsskapur við umleið 700.000 limum um allan heim. Limir í hesum felagsskapi koma úr øllum samfelagsstættum. Teir eru fríir fyri allar bindingar til motorsúkklu-umhvørvið og eru politiskt og fíggjarliga óbundnir hvør av øðrum. Limirnir er bert saman fyri at hava góðar upplivingar og njóta teirra felags áhugamál, Harley Davidson motorsúkklurnar. Skipað verður fyri túrum fyri einstaklingar og familjur, eisini túrar uttanlands.

### Innsavning til Barnaheimið

Vanligt er at Harley Davidson felagsskapir gera nakað fyri børn. Her hjá okkum savnar felagsskapurin pening til Barnaheimið í Havn. Peningurin er oyramerktur til eina ferð fyri børnini á Barnaheiminum í Havn í summar. Í hesum sambandi er ætlanin at hava opið hús á Barnaheim-inum Kristi Himmalferðardag tann 29. mai, har motorsúkklistar úr Danmark og Svøríki eisini vera við. Donsku og svensku gestirnir hava leikur við til børnini og ein peningagáva verður handað. Børnini sleppa eisini ein túr á baksetrinum á Harley Davidson motorsúkklunum.

Tey ið ynskja at stuðla tiltakinum, eina ferð fyri børnini á Barnaheiminum í summar, kunnu seta pening inn á eina klientkonto hjá Annfinn V. Hansen advokati, konto í Føroya Banka: 6460 1022875.

Adressan hjá HD-fo er: Djóna í Geilsgøta 33 FO-100 Tórshavn. Tel. 210405.

Harley Davidson motorsúkklur verða sýndar fram í SMS (3-arin) frá 26. mars til 5. apríl. Fáið meira at vita á heimasíðuni: www.hd-fo.dk

## 100 ár við Harley Davidson

**Heimskendu amerikansku Harley Davidson motorsúkklurnar hava nú verið á marknaðinum í 100 ár. Harley Davidson vórðu millum tær fyrstu hópframleiddu motorsúkklurnar í heiminum.**

*Magnus Gunnarsson*

Tað vóru barndómsvinirnir Arthur Davidson og Bill Harley, ið stovnaðu Harley Davidson motorsúkkluverksmiðjuna í Milwaukee í Wisconsin í USA í 1903. Fyrsta árið vóru bert tríggjar súkklur framleiddar, men tað gekk tó skjótt framá. Í 1911 vóru framleidda 5625 súkklur. Hetta varð eisini árið, tá hópframleiðslan av motorsúkklunum viðtveimum sylindarum byrjaði. Hendan súkklan við V2 motorinum bleiv ímyndin av Harley Davidson motorsúkklunum.

Hóast Harley Davidson motorsúkklurnar hava fingið harða kapping frá súkklum sum t.d. Triumph, Norton, BSA og seinnu árini frá japansku motorsúkklunum, hava tær klára seg væl gjøgnum hesi hundrað árini.





Ford Motor Company
100 ár

Ford Focus Fakta:

1. Mest feilfríi samb. TVU kanning.
2. Mest seldi bilur í heiminum 2000/2001.
3. Ársins bilur 1999.
4. Kom á toppin við einum nýggjum Ford Focus.




100 ára jubileumstilboð!

100 x 100 kr. avsláttur = 10.000 kr.

Inkl. Metallakk
Inkl. Radio við fløguspælara
Inkl. Alufelgur
4 vetrardekk á felgum fyri ½ prís

Bilurin er heilgalvaniseraður
12 ára rustgaranti
2 ára mekaniskan garanti
Avmarkað nøgd á lagri

SJÓNBAND 317774

Upplatingartíðir: Mánadag -Fríggjadag: 8.00 - 17.30 - Leygardag: 10.00 - 16.00


Jóhan Petur
tlf. 354508


Jógvan
tlf. 354505


Lennard
tlf. 354506

P/F Wenzel

www.wenzel.fo, Akranesgøta 5, tlf. 354500.